## Carpark North skulu hita upp fyri Moby



Amerikanski tónleika úrmælingurin Moby, hevur biðið Carpark North um at hita upp fyri seg á tveimum konsertum í Dresden og Berlin í november.

Beint áðrenn Carpark North vóru í Føroyum spældu teir á týsku tónleikamessuni Popkomm í Berlin, aftan á konsertina hittu teir umboðsmannin hjá Moby, ið dámdi danska bólkin sera væl. Í samrøðu við Sosialin áðrenn konsertinar í Fuglafirði segði sangarin í bólkinum Lau, at okkurt fór at spyrjast buturúr fundinum við umboðsmannin, men at hann ikki kundi siga nakað enn, fyribils sær tað út til, at hesin møguleiki er komin í lag á fundinum.

Nýggjasta fløgan hjá Carpark North verður í næstum útgivin í Týsklandi, og bólkurin arbeiðir í løtuni við at vinna inn á henda markna. Tí er hetta ein stórur møguleiki.

**nud**

## Petur hevur fingið nýtt spælipláss



Heimasíðan hjá Peturi Pólson hevur fingið nýtt andlit, hon er nú vorðin enn ein áhugaverdur miðil har fjøllbroytti listarmaðurin sleppur at spæla sær. Tað er ein av vinnarunum av AME virðislønini fyri besta fløguhúsa Uni Árting, sum hevur gjørt síðuna.

Innihaldið eigur Petur sjálvur, nógv av tilfarinum snýr seg um komandi fløguna hjá Peturi "Koma"

Á síðuni ber til undir hugarensl at lesa um Petur sum liggur og frætar í baðikarinum. Í tí meira upplýsandi partinum ber til at lesa um Petur hinar, ið spæla á fløguni, eisini kann man lesa um løgini, og allir tekstir eru somuleiðis á heimasíðuni. Av øðrum kann nevnast myndasøvn og tíðindi. Samanumtikið eitt stuttligt spælipláss há einum fjøllbroyttum listarmanni.

**nud**

## Andreas í Glitnir

Aftur hetta hóskvøldið verður livandi tónleikur í Glitni. Eins og seinasta hóskvøld verður tað Andreas Arge, ið spælir Unplugged. Andreas spælir eisini sunnukvøldið á nýggjasta pallinum fyri livandi tónleik í Havn.

Glitnir hevur síðan tað lat upp, havt livandi tónleik í vikuskiftunum, men seinastu vikurnar eru hóskvøldini eisini vorðin kvøld við livandi tónleiki, har unplugged konsertir eru á skránni.

**nud**

## Eivør blívur smápartafelag

Í síðstu viku varð Sp/F Eivør Pálsdóttir stovnað hjá Skráseting Føroya. Stjóri í felagnum hjá føroysku songkvinnuni er Sigvør Laksá, sum eisini er umboðskvinna hjá Eivør.

Smápartafelagið Eivør Pálsdóttir er heimahoyrandi í Gøtu. Í nevndini eru pápi Eivør, Páll Jacobsen, sum er nevndarformaður, Oddvá Nattestad í Havn og Óli Høgnesen í Leirvík.

**ek**

## Pipar & Salt reyk upp í topp

Sangurin Høm Høm hjá tí legendariska og eggjandi Melvis Stardust kom beinleiðis inn sum nummar 1 á 15 teimum bestu

Seinastu vikuna hevur sangurin Høm Høm hjá Pipari & Salti verið eykalag á 15 teimum bestu, og tey, sum atkvøða á listanum, hava rættiliga tikið sangin til sín, tí hann kom beinliðis inn sum nummar 1 á listanum.

Harvið skumpaði Melvis Stardus poppidolið James Blunt av tí fremsta plássinum, sum bretin hevur ligið á seinastu vikurnar.

Leygarkvøldið hevði Pipar & Salt framførslu í Klaksvík, og har undirhildu teir fyri eini 1200 fólkum í KÍ-høllini. Melvis var sjálvandi á pallinum og sang best umtókta sangin á 15 teimum bestu.

**ek**

# Páll Finnur Páll á konsertferð

**Væl dámdi tónleikabólkurin Páll Finnur Páll fer í næstum á eina lítla konsertferð í Føroyum. Tríggjar konsertir eru á skránni hesaferð, og fyrsta konsetin verður longu komandi leygarkvøldið í Hvalba**




KONSERTFERÐ

Hinar báðar konsertirnar verða ávikavist í høllini á Kambsdali leygarkvøldið 15.oktober og í Ítróttarhøllini á Hálsi tann 22 oktober.

Páll finnur Páll spælir góðan og íoyrafallandi poprocktónleik, og tað, sum kanska ger júst hendan bólkin áhugaverdan, er teirra serstøku, óinnballaðu, náðileysu, ósensureraðu, men tó skemtingarsomu tekstir. Onkur hevur tikið soleiðis til og sagt, at »teir eru bara so flovisligir«, men kortini so tykist tað avlíkavæl, sum hvør og ein syngur við, tá ið t.d. »Blottarin« ella »Pedofilurin« er á skránni. Alt annað líka kann eingin pástanda at Páll Finnur Páll er ein keðiligur tónleikabólkur og tað er eisini altíð sera góður stemningur og lív í, tá ið teir eru á palli.

Sjálvt um sera nógvar áheitanir hava verið, so er tað kortini fyrsti ferð at Páll Finnur Páll spæla í Suðuroynni, nú teir spæla í Roynhøllini leygarkvøldið.

Eisini verður diskotek við »nýtt og gott gamalt«. Bussar koyra.

# Omman hjá Símuni á fløgu

**Ein nýggj fløga er komin í handlarnar, ið stutt og greitt ber heitið »Omma«. Talan er um eina endursavnsfløgu við 10 løgum á. Tað er Símun úr Konoy, ið hevur savnað saman nakrar sangir, sum hann hevur heintað úr nøkrum av mongu kassettubondunum, hann gav út í áttatiárunum**

FLØGUÚTGÁVA




Innihaldið er sera fjølbroytt. Umframt kenda sangin um ommuna kunnu nevnast sangirnir »Juhuu«, ið er um ein barnafødingardag, og óvanliga syrgiligi sangurin »Spruttkoyrarin«, ið er um ein drong, sum í fyllskapi saman við gentu síni setir seg í skjóttkoyrandi bilin og á henda hátt við einum braki kemur at taka lívið av henni.

Símun úr Konoy hevur sjálvur gjørt bæði orð og lag til tveir av sangunum á fløguni. Hini løgini eru lænt og umsett til føroyskt av ávikavist Símuni, Gunnleivi Thomsen og Helga Abrahamsen.

Tónleikarar á ommufløguni eru: Jóhannus á Rógvu Joensen, Ólavur Øster, Ronnie Nielsen, Kári Poulsen og Símun úr Konoy.

# Ráðstevna um at yrkja sálmar

**Leygardagin verður ráðstevna í dansistovuni í Norðurlandahúsinum um at yrkja sálmar. Byrjað verður klokkan 10:00 og hildið verður á fram til klokkan 17:30. Rithøvundafelagið og Urguleikarafelagið skipa fyri**



SÁLMAYRKING

Við á ráðstevnuni eru íslendingurin Hjørtur Pálson, sum hevur verið við til at valt út sálmar til íslendsku sálmabókina og danin Hans Anker Jørgensen, ið hevur skrivað sálmar, sum eru á markinum til at vera annað enn bara sálmar.

Nevnast kann, at ein eitur »Vi tror ikke på løgn og reklamer«.

Eisini vera prestarnir Jákup Reinert Hansen, sum helst er tann, ið veit mest um sálmar í Føroyum, og Meinhard Bjartalíð, sum hevur granskað í sálmum og sálmasangi, við á ráðstevnuni.

- Vit í Føroyum hava eina sera sterka sálmasiðvenju, og á bygd er kanska ikki so langt frá innihaldinum í góðu gomlu sálmunum og til nútíðina. Har er enn fiskiskapur, og bóndasamfelagið er ikki heilt burtur sjálvt um hentleikarnir eru vorðnir munandi betri. Í býunum, har talið á íbúgvarum er støðugt vaksandi, er øðrvísi. Har eru sálmarnir heldur ein flýggjan til tað gamla og siðbundna, og onki ringt um tað, men kanska hevði verið gott, um vit fingu sálmar, ið bóru fram evni, sum passaðu inn í nútíðarsamfelagið og góvu eina lýsing av dagsins trúðarlívi, siga Rithøvundafelagið og Urguleikarafelagið.